## Kvinnusteypið um vikuskiftið

Kappingin um Kvinnusteypið fer fyri fyrstu ferð av bakkastokki í morgin, leygardagin. Henda kappingin er lík Klaksvíkskappingini, men einasti munurin er, at nú er tað ovastu kvinnuliðini, sum kappast. Liðini, sum fara at spæla um Kvinnusteypið í ár, eru KÍ, AB, EB/Streymur og B36, sum eisini skipar fyri kappingini. Hálvfinalurnar vera í morginárini kl. 10 á ovara og niðara vølli í Gundadali, meðan finalan verður í annaðkvøld. Lutakast verður um hálvfinalurnar í morgin.

## Newcastle úti av UEFA-kappingini

Newcastle hevði vunnið fyrra dystin á heimavølli móti AZ Alkmaar, og tí høvdu teir eitt gott útgangsstøði undan seinna dystinum. Her var AZ nógv betra liðið, og teir løgdu Newcastle undir trýst frá byrjan av. Longu eftir 13 minuttum legði Shota Arveladze AZ á odda, og 10 minuttir eftir steðgin økti Danny Koevermans til 2-0. Í síðstu minuttunum var AZ nærri við at økja til 3-0, enn Newcastle var við at minka um munin, og m.a. hevði Arveladze eitt skot á tvørtræið. Við 2-0 sigrinum hevur AZ Alkmaar tryggjað sær víðari luttøku í UEFA-kappingini orsaka av regluni um flest skoraði mál á útivølli.

# Fýra Formula uppgerðir

**Lokaluppgerð í høvuðsstaðnum og tríggjar áhugaverdar uppgerðir í Eysturoy eru á skránni, tá ið 2. umfar í steypa-kappingini verður á skránni í morgin**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Í morgin verður sjøtul av álvara settur á nýggja fótbóltsárið. Tá verður 2. umfar í kappingini um Løgmanssteypið. Átta uppgerðir eru á skránni. Øll tey tíggju liðini í bestu deildini skulu dystast, og í fýra førum verður talan um Formula uppgerðir.

Meistararnir og sigursvanda steypaliðið HB skal við NSÍ liðformanninum í fjør Christiani Høgna Jacobsen á liðnum til Runavíkar, har NSÍ skal royna seg fyri fyrstu ferð, síðani teir fingu venjarar og nógv fólk av Skála.

Í Gundadali verður grannauppgerð millum steypavinnararnar í B36 og uppflytararnar í AB. Nýggir ábyrgdarmenn eru á beinkinum hjá báðum liðunum. Talan er um gamlar liðfelagar – bæði í KÍ og í LÍF. Kurt Mørkøre hevur ábyrgdina av B36, sum millum spælararnar hevur Allan Mørkøre, ið var liðformaður á Argjum í fjør, og Oddbjørn Joensen hevur ábyrgdina av AB.

Uppflytararnir av Sandi eiga við ungum liði stóra avbjóðing í Streymnesi, har EB/Streymur bíðar. Hanus Eliasen og Símun Eliasen eru nýggir spælarar á felagsliðnum.

Í Gøtu vitjar KÍ, sum í fjør tapti steypafinaluna. Millum gestirnar í Sarpugerði eru eitt nú Kaj Ennigarð og Gunnar Nielsen, sum í fjør vóru við til at manna GÍ liðið.

Fimm av teimum átta uppgerðunum í morgin verða í Eysturoy. Umframt dystirnar í Runavík og í Gøtu verða eisini uppgerðir á Skála, í Fuglafirði og í Leirvík.

Skálamenn skulu við nýggjum ábyrgdarmanni á beinkinum royna seg ímóti FSV04. Hjá ÍF tykist uppgávan ikki ræðandi, tá ið UNDRI, sum er einasta felagið, sum ikki er umboðað í aðrari av teimum teimum ovastu deildunum, fer at vitja, meðan tað eigur at fara at verða torførari hjá LÍF, tá ið teir fara at fáa vitjan av VB/Sumba.

Á Sevmýri verður talan ivaleyst um spennandi uppgerð millum tvey 1. deildarlið. TB, sum fyri viku síðani á heimavølli vann 2-0 ímóti B68, eigur aftur hesa ferð heimavøll. Gestirnir hesa ferð eru SÍ.

Fjórðringsfinalurnar verða Kristi Himmalferðardag, sum er hósdagin 17. mai.



*Lagt verður upp til eitt brak í kappingini um Løgmassteypið leygardagin, tá ið NSÍ tekur ímóti HB við Løkin*

### Dystir og dómarar

| | |
|---|---|
| NSÍ-HB | Páll Augustinuassen |
| GÍ-KÍ | Dagfinn Olsen |
| B36-AB | Jens Petur Brattalíð |
| EB/Streymur-B71 | Lars Müller |
| Skála-FSV04 | Rúni Gaardbo |
| LÍF-VB/Sumba | Ransin N. Djurhuus |
| TB-SÍ | Eiler Rasmussen |
| ÍF-UNDRI | Vinjard Dam |

# Svimjarar við í Danish Open

**Fimm føroyskir svimjarar vóru við í Danish Open um vikuskiftið, sum er stór kapping fyri rørslu- og menningartarnað**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*

Vikuskiftið 9.-11. mars var stór svimjikapping hildin í Esbjerg fyri rørslu- og menningartarnað. Við í kappingini vóru fimm føroyskir svimjarar: Ragnvaldur Jensen, Apolonia Justesen, Dann Akursmørk, Osvald Hansen og Heidi Andreasen.

Danish Open er opið Danmarkmeistaraskap fyri svimjarar við breki, t.v.s at svimjarar kring allan heimin verða bjóðaðir at vera við. Millum luttakandi londini vóru m.a. Kina, Ungarn, Týskland og Holland, sum eiga nógvar av heimsins bestu svimjarum. Fleiri av teimum vóru eisini við til hesa kappingina, so stuttligt var at siggja, hvussu væl okkara svimjarar royndust í hesum hópi.

Úrslitið hesaferð gjørdist tilsamans 15 heiðursmerkir: 6 gull, 4 silvur og 5 bronsuheiðursmerkir, sum er eitt avbera gott úrslit. Heidi Andreasen svam heim 4 gull og 3 bronsuheiðursmerkir, Apolonia Justesen fekk 2 silvur og 2 bronsuheiðursmerkir og Ragnvaldur Jensen 2 gull og 2 silvurheiðursmerkir.

Ein týðilig betring sæst hjá øllum okkara svimjarum. Fleiri persónlig met vóru sett, sum í svimjarahópi siga nógv meira enn eitt heiðursmerki. Serliga tá talan er um 9-ára gamla stjørnuskotið Dann Akursmørk úr Klaksvík. Hóast Dann eingi heiðursmerkir vann í hesari kappingini, svam hann nakrar framúr tíðir, sum leggja hann í toppin ímillum sínar javnaldrar. So vónirnar eru stórar fyri unga svimjaran.

Fyri góðum mánaða síðani var landsliðið yviri í Malmø, har tey luttóku í Malmø Open. Úrslitini frá hesari kappingini vóru framúrskarandi. Allir svimjararnir settu persónlig met í næstan øllum, sum varð svomið. Svimjararnir fingu 2 gull, 2 silvur og 1 bronsuheiðursmerki við heim og harafturat eitt steyp, sum Ragnvaldur Jensen svam heim í FIFH-Cup í 50 metra frísvimjing.

Næsta stóra svimjikappingin verður International German Swimming Championships í Berlin. Kappingin er av sama slagi sum Danish Open, men nógv størri. Tað er til hesa kappingina, vit kunnu vænta at síggja heimsins bestu svimjarar við breki. So spennandi verður at síggja, hvussu føroysku svimjararnir fara at klára seg ímóti teimum.

Annars kunnu úrslitini frá Malmø Open síggjast á www.malmo-open.com, og úrslitini frá Danish Open kunnu síggjast á www.swim.dhif.dk/danishopen.html

## Toppskjúttar í hondbólti

**Atlantic Airways kappingin:**

| | | |
|---|---|---|
| Damir Oros | KÍF | 151 |
| Finnur Hansson | StÍF | 145 |
| Blagoje Buha | Neistin | 121 |
| Sámal Joensen | VÍF | 121 |
| Rókur Akralíð | Kyndil | 120 |
| Esbern Patursson | H71 | 118 |
| Daniel Rapa | KÍF | 109 |
| Agnar Joensen | VÍF | 99 |
| Tróndur Kragesten | Neistin | 92 |
| Hans Áki Dal Christiansen | Kyndil | 91 |

**Sunset kappingin:**

| | | |
|---|---|---|
| Nicoleta Radu Hansen | Neistin | 149 |
| Daiva Tuomaite | VB | 124 |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 97 |
| Ninna K. Johansen | StÍF | 95 |
| Lina Andriulyte | Kyndil | 92 |
| Simona Petersen | Stjørnan | 84 |
| Alina Olaru | Stjørnan | 74 |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 59 |
| Ivana Ljubicic | VB | 56 |
| Anja Heinadóttir | Kyndil | 53 |